# Kjak



Heini Olsen
*Kovalág 5. maj 2010*

## Varðveitið tað 944 ára gamla sýsluheitið

Í sínari tíð fóru vit øll undir kong, og søgukøn vilja vera við, at í 1066 kom Ólavur kongur Kyrri av Noregi til Føroya fyri at fáa skil á innlendis ófriði landnámsfólksins, t.e. teirra eftirkomarum, ið hvør sum harðastur royndi drepa hvønn annan.

### Sýslur

Ólavur kongur Kyrri lutaði landið sundur í hóskandi geografiskar sýslur, hvør við sínum sýslumanni, ið síðan ta tíð við løgregluvaldi hevur hildið í nakkan á okkum, at vit ikki av berari maktgyrnd skuldu forkoma hvørjum øðrum.

At sýslumansembætið nú kanska er avoldað er einki at siga til; men eg haldi vit skulu varðveita sýsluheitið sum brúkbart fornminni, eitt nú sum Suðuroyar sýslu kommuna, ið fevnir um alla Suðuroy og báðar Dímunar, Sandoyar sýslu kommuna við Skúvoy, Vága sýslu kommuna við Mykinesi, Streymoyar sýslu kommuna við Nólsoy, Hesti og Koltri, Eysturoyar sýslu kommuna og Norðoya sýslu kommuna fevnandi um allar oyggjarnar í landnyrðingsparti Føroya.

***At sýslumansembætið nú kanska er avoldað er einki at siga til; men eg haldi vit skulu varðveita sýsluheitið sum brúkbart fornminni.***

Býtið kann sjálvandi vera ørvísi; men hyggja vit yvir Føroyakortið, man býtið Ólavs ikki hava verið heilt av leið.

Sýslurnar eru ivaleyst komnar um somu tíð í øll Norðurlond, og í Noregi er tann á Svalbard tann einasta, sum er varðveitt. Í Danmark sløðist farvegur av sýslu eftir í navninum Vendsyssel; men í hinum eru tær mær vitandi heilt horvnar.

Í Føroyum kann mangt vera sagt fyri og ímóti sýslum og sýslumonnum. Ikki hevur skipanin enn rokkið at steðga innlendis klandri; men í hvussu er ganga vit ikki longur og drepa hvønn annan, og sum børn vórðu vit mangan hótt við at fara eftir sýslumanninum, um vit ikki skikkaðu okkum væl, so virðing – ella kanska ræðsla – fyri embætinum man hava fest seg í ungum sum í gomlum.

### Len

Fyrsta tiltak í Norðurlondum av hesum slag var, tá Valdemar II Sejr eftir mangar sigrar í 1227 tapti og gavst at kríggjast. Tað, eftir var av tíð sínari, fekst hann við innlendis viðurskifti, m. a. lutaði hann landið sundur í len, fekk skrivað Jarðarbók Valdemar kongs og stutt fyri sín deyð setti í gildi Jútsku Lóg.

Hesin sami Valdemar kongur var tann sum í 1219 í Estlandi gav boð um at varðveita flaggið, sum ein hvirla onkustaðni hevði skrykt leyst og slept niður yvir danska herliðið – tað sonevnda Dannebrog. Eisini var tað hann, sum 1205 giftist Dagmar drotning, misti hana og 1214 giftist upp aftur við Berengariu.

Í Noregi er lensheitið varðveitt.

### Amt

Í Danmark vórðu lenini í 1662 niðurløgd og amtsskipanin sett í gildi. Amtini fóru fyri stuttum í søguna og skift um við Regioner, ið tilkomnir danir eru sera illa nøgdir við. Hví skuldi hetta fremmanda heitið heilt óneyðugt troka hálva fjórðu øld gamla amtsheitið av?

### Sýsluheiti, kristni og Løgting

Okkara 944 ára gamla sýsluheiti er eftir øllum at døma eldri enn alt tað áður nevnda, heili 161 ár eldri enn nakað annað tílikt í Norðurlondum, kanska einar tvær øldir yngri enn Løgtingið og javngamalt at kalla við kristni her á klettum, og ongatíð betur, um heitini enn og framyvir formliga kunnu nýtast.

Eg vil mæla til at varðveita tey øll trý.



Heri Mohr

## Javnstøði ella feminisma

Í Weekendavisen nú um dagarnar er áhugaverd grein um, hvussu ein svenskari, Pär Ström, er av teirri áskoðan, at feminisman er farin av sporinum og avskeplar vanligt vit og skil.

Hann sigur, at tað er kávalæti, at feminisman fremur kynsstríð kvinnum at gagni. Í veruleikanum er tað áhugamál hjá ávísum kvinnubólkum, og als ikki javnstøði, ið feministar stríðast fyri.

Kvinnan er ikki hjálparleys, sum feminisman vil vera við. Kvinnur er sterkar, og júst sum menn brúka tær teirra vald – við góðum ella við illum. Er hansara niðurstøða.

Hann sigur bart út: Eg ákæri feminismuna fyri at hava tikið monopol upp á at definera hugtakið javnstøði og at hava definerað tað skeivt. Eg ákæri feminismuna álvarsliga fyri at gera ov nógv av við trupulleikum og vandamálum, sum kvinnur fáa, og hinvegin miðvíst at tiga burtur ella avnokta fyrimunir, tær hava, tí tær eru kvinnur.

Hann vísir á, at í 95 procent førum, er tað kvinnan, ið vinnur, tá eini ikki-hjún klandrast um foreldrarættin hjá børnum.

Og at eingin á samfelagsplani rættiliga tímir at gera nakað við mannfólkasjúkur t.d. prostatakrabba, sum krevur 62 procent fleiri deyðsføll enn bróstkrabbi. Hóast hetta, er tað einans móti bróstkrabba, at fyribirgjandi screening verður framd.

***Kvinnan er ikki hjálparleys, sum feminisman vil vera við. Kvinnur er sterkar, og júst sum menn brúka tær teirra vald – við góðum ella við illum.***

Kvinnan livur í meðal fimm ár longri enn maðurin, men tað verður ikki viðgjørt sum eitt vandamál fyri javnstøðu. Um tað hevði verið kvinnan, ið livdi fimm ár styttri enn maðurin, hevði tað óivað verið ført fram sum órættvíst, og sum skjótast gjørligt skuldi verið bøtt um við neyðugum, serstøkum tiltøkum í heilsuverkinum og við medicinskari gransking.

Í lógini um revsing fyri harðskap í heimum (í Svøríki/hm) er tað tilskilað, at tað er maðurin, sum slær kvinnuna, ið skal revsast, og ikki tað øvugta.

Tá menn frá náttúru hond eru meira kappingarmerktir, meira vágafúsir og duga betri at fokusera, er tað kanska ikki so løgið, at teir eru heppnari í karrieruni, og tí hava teir yvirlutan í stjórakorridorunum.

Biologisk hava ógvuliga intelligentir og óintelligentir menn meirilutan. Tað er tessvegna ikki løgið, at menn eru í meiriluta millum nobelprísvinnarar.

Kvinnur eru sterkar, smartar og maktfullar og føra kynsstríð til egnan fyrimun – krógvað undir fyribrigdinum javnstøði.

Í Svøríki merkir javnstøði reelt altíð bara fleiri fyrimunir til kvinnuna, vil Pär Ström vera við.

Fólk takka mær fyri, at eg tori at siga tað, sum fólk hugsa, men ikki tora at siga, sigur Pär Ström.

Viðmerking frá undirritaða: Fyri nógvum árum síðani kom feminisman í mótvind. Ræðslan og andstygdin hjá rithøvundanum Stefan Zweig fyri rúgvu-ideologium (ismum), sum lemjandi hevði merkt hansara tilveru (eins og hjá so mongum øðrum), og sum var orsøkin til, at hann tók lívið av sær, setti sjálvandi síni spor.

Tann nýggja kvinnurørslan (javnstøði), um okkara leiðir tykist at hava viðrák, men hví hon skal stuðlast við skattaborgaranna peningi, er tað ikki øll, ið skilja. Tað mátti verið nóg mikið, at javnstøðið verður vart við løgum, har tað er neyðugt, og annars við mannsømiligari virðing hvør móti øðrum.

Eitt nú at seta fólk í størv v. m. eigur ikki at verða gjørt við atliti at kyni og trúgv. Har má tað vera skúli, kvalifikatión, event. útbúgving, karaktereginleikar (samstarv, reinlindi), kreativitetur, ið gera munin. Kyn og trúgv og politiskur litur eiga generelt ongantíð at ávirka starvsseting. Slík nepotisma er sera ódámlig og skaðilig.